gult14 cyan14 magenta14 svart14



Karisma skipaði fyri:

# Stór hvítusunnustevna við Aril Edvardsen

**Stóra árliga Hvítusunnustevnan í Ítróttarhøllini á Nabb við kenda norska evangelistinum Aril Edvardsen fylti enn eina ferð høllini við spentum áhoyrarum og nógvum sangi. Eisini børnini høvdu sína egnu hvítusunnustevnu í B36 húsinum og dámdu sera væl.**

*Frítór Debes*



*Stórur áhugi var fyri árligu hvítusunnustevnuni í Ítróttarhøllini á Hálsi, við norska evangelistinum Aril Edvardsen*

Tað var evangeliska samtakið KARISMA, ið hevði tikið stig til at bjóða kenda norska evangelistinum úr Kvinesdal í Noregi hendavegin. Aril Edvardsen hevur virkað í tænastu Harrans í yvir 40 ár og hevur sæð ótalligar skarar av menniskjum boygt síni knø fyri Jesusi Kristusi. Í dag góð 40 ár eftir, at hann fekk visiónina fyri heimsmissión, so fevnir arbeiði hansara út frá Sarons Dal yvir 200 londum. Hetta sigur ikki so lítið um mannin handan boðskapin. Aril Edvardsen er uttan iva tann norðurlendingurin, ið hevur tosað til flest menniskju nakrantíð. Arbeiðsøki hansara er ógvuliga víðfevnandi: Hvørt ár hevur hann stórar evangeliskar kampanjur runt um í heiminum, har nógv menniskju verða frelst og grødd. Ein brævskúli er eisini, ið hevur havt yvir 4 mill. næmingar, har flestu teirra eru blivin persónlig kristin. Media arbeiðið strekkir seg víða. Via satelitt nær hann uml. 1,2 milliardir menniskju hvønn dag í vikuni við evangeliinum. Sarons Dal hevur potentiali til at senda til allan heimin via satelitt uppá 2 sekund. Men sum vit vita, so kosta sendiloyvini sera nógv. Ein onnur grein, ið hevur eyðkent arbeiði útfrá Sarons Dal sera nógv, er Innfødd Evangelist Missión, ið hevur havt í túsundatali av innføddum trúboðarum síðani fyrst í 60unum. Í dag hevur missiónin ábyrgd fyri uml. 1200 monnum og kvinnum runt um í heiminum. Hesi eru øll á lønarlistanum hjá Sarons Dal. Skoytast skal annars uppí, at nógvir eru teir føroyingar, ið hava stuðlað hesum sera effektiva arbeiði gjøgnum nógv ár. Viðvíkjandi Aril Edvardsen kann eisini skoytast uppí, at hann hevur skrivað yvir 40 bøkur.

## Nógv leitaðu sær niðan at hoyra evangelistin

Tað var stuttligt at síggja ung sum eldri leita sær niðan á Háls fyri at hoyra kenda evangelistin. Og Orðið fingu tey so sanniliga at hoyra. Hetta var ikki einhvør. Tað sást á øllum brøgdum, at hetta var ein prædikumaður í tungvektklassanum í heimsformat. Við hvørt so rungaði láturin gjøgnum høllina fyri síðani at lata álvarsemi taka yvir aftur. Møtini vóru ein blanding av vekingarmøtum og undirvísing. Á kvøldmøtunum bleiv bjóðað fram til frelsu og fleiri vóru tey, ið góvu síni lív til Jesus Kristus. Eitt annað, ið eisini eyðkendi hesi møti var, at nógv fráfallin leitaðu sær aftur til Harran.

Av tí, at tað var Karisma, ið skipaði fyri møtirøðini, so vóru tað fólk frá teimum ymsu samkomunum, sum luttóku bæði við at leiða tey ymsu møtini og viðvíkjandi sanginum.

## Børnini høvdu sína egnu hvítusunnustevnu

Eitt tiltak, ið eisini gav stór úrslit, var at B36 húsið varð leigað til at hava barnamøtir í meðan kvøldmøti var í høllini á Nabb. Hetta vísti seg eisini at eydnast sera væl. Tað var soleiðis, at børnini komu við foreldrum sínum á møti uppi í høllini og vóru við tann fyrsta hálva tíman, meðan sungið bleiv. Síðani marsjeraðu øll 2-300 børnini oman í B36 húsið, har nógv spennandi bíðaði teimum. Har kundu tey syngja, hoyra orðið, spæla, síggja drama, klovnar, fáa okkurt til ábit o.s.fr. Tað sást og hoyrdist á øllum brøgdum, at børnunum dámdi hetta sera væl. So uttan iva verður hetta eitt afturvendandi tiltak fyri børnini á Hvítusunnu. Eisini kann skoytast uppí, at t.d. tað eina kvøldið fingu øll børnini eina forgyltað medalju um hálsin, har skrivað stóð: hvítusunnustevnan 2001. Fólk frá teimum ymsu samkomunum tóku sær av hesum barnamøtum. Saman um tikið so eydnaðist hetta tiltakið hjá børnunum sera væl.

## Boðskapurin hjá Aril Edvardsen

Tað, ið eyðkendi vekingarboðskapirnar hjá Aril E. vóru tær klassisku evangelisku talurnar. Stuttligt var at hoyra hann útleggja Guds Orð og tala við einum slíkum myndugleika, ið bert persónar, ið hava hoyrt frá Himlinum kunnu gera. At boðskapirnir hava sett seg fast hjá áhoyrarunum í nógv ár fram er einki at ivast í. Saman um tikið má sigast, at Hvítusunnustevnan 2001 var væl eydnað. Vónandi verður tað ikki long tíð til Aril Edvardsen kemur aftur til hesar oyggjar.

*Tummas Jacobsen, samkomuleiðari í Filadelfia í Havn*









gult15 cyan15 magenta15 svart15



*Aril Edvardsen, evagelistur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Aril Edvardsen – bygdardrongurin, sum gjørdist heimsevangelistur

**Hóast tað eru uml. 20 ár síðani Aril Edvardsen vitjaði í Føroyum, og hóast eitt heilt nýtt ættarlið er vaksið upp síðani tá, so kláraði hann enn eina ferð at fylla ítróttarhøllina**

*Britt Rasmussen*

Føddur í 1938 er hann ikki nakar unglingi longur. Oldurabbin á pápasíðuni var týskur jødi og kom til Noregs sum glasverksarbeiðari. So navnið Aril er jødiskur arvur, tað er tað bíbilska navnið Ariel, sum hann hevur fingið navn eftir. Ariel merkir Guds leyva, og ævintýrið fyri Guds leyvu í Sarons Dal byrjaði í oktobur 1956 tá ið Jesus Kristus, Guds sonur møtti hesum unga manni og umbroytti lív hansara fullkomuliga.

## Hitt gamla evangeliið

Og hvat var tað so, øll hesi fólkini komu niðan á Nabb at hoyra hesar dagar – jú, einfalt og greitt hitt gamla evangeliið – áheitanina um at velja meðan vit hava møguleikan. Aftur og aftur sóu vit neyðina á hjarta hansara fyri at fáa menniskju frelst, bjargaði undan einari ævigari glatan. Aftur og aftur vísti hann á, at tað ikki finst ein gyltur millumvegur, men bert tveir vegir, antin gongur okkara leið móti myrkursins ríki ella móti Guds æviga ríki.

## Greiddi frá arbeiðinum

Við á ferðini higar var eisini blaðstjórin á blaðnum Troens Bevis, Harald Mydland, og greiddi hann okkum frá um tað stóra arbeiðið, sum gongur út frá Sarons Dal. Vit sóu onkur brot frá arbeiðnum ymsastaðni í heiminum. Hoyrdu um arbeiðið við innføddum evangelistum, sum Sarons Dal hevur verið serliga kent fyri. Hetta, at brúka fólkið á staðnum, at stuðla teimum, so teirra landsmenn kunnu verða náddir við evangeliinum. Eisini takkaðu teir hjartaliga øllum teimum føroyingum, sum í mong ár hava stuðlað hesum arbeiði.

## Hvørt eyga skal síggja

Hóast øll evnini, hann hevði, vóru sera áhugaverd, so vil eg her nevna eitt sindur frá leygarkvøldinum, tá ið hann tosaði frá Opinberingini 1,7, sum sigur: Hann kemur við skýggjunum, og hvørt eyga skal síggja Hann … Vit vita, at tá ið Jesus fór til Himmals, fór hann frá Oljufjallinum, og bert tey, sum tá stóðu har sóu hann fara. Men Bíblian sigur, at hann kemur aftur á sama hátt, niður á Oljufjallið og hvørt eyga skal síggja hann. Ikki bert tey, sum tá eru nærhendis Oljufjallinum, men eisini vit her á lítla Føroyalandi, ja øll kring alla jørðina. Hevur hetta verið møguligt tá ið abbar og langommur okkara livdu? Nei. Men nú í okkara tíð, síggja vit beinleiðis sendingar allastaðni frá í heiminum, tí fjølmiðlafólkini eru sum flugur alla staðni har nakað hendir. Fjølmiðlakongurin Ted Turner, sum stovnaði CNN, hevur sagt, at um tað skuldi hent, sum hann sjálvur ikki trýr, at Jesus skjótt kemur niður á Oljufjallið, so hevur CNN longu sett síni upptøkutól upp í Jerusalem, fyri at tíðindini kunnu sendast kring allan heimin so skjótt sum tað hendir. Men ein so stór hending, sum Jesu sjónliga afturkoma verður ikki bert stórtíðindi hjá CNN, men hjá øllum sjónvarpsstøðum kring allan heimin, ja fyri internet brúkarar og fartelefonbrúkarar við telduskíggja.

## Satelittarnir sum »broyttu« jørðina

Í Matteus 24,3 spyrja lærusveinarnir Jesus um hvat er teknið fyri at hann kemur aftur og endi er á tíðini. Í 14 ørindi sigur Jesus: Hetta evangelium ríkisins skal verða prædikað um alt jarðarríki, øllum fólkasløgum til vitnisburð; og tá skal endin koma. Enn er evangeliið ikki prædikað um alt jarðarríkið, ella har tað eru hús, heim, bústaðir, sum grundteksturin sigur. Tó vita vit, at evangeliið hevur størri framgongd í dag enn nakra aðra tíð í søguni. Og eitt av amboðunum, sum í dag vera brúkt eru satelittarnir. Eisini har hevur Aril Edvardsen verið framsíggin, so at tey í dag í Sarons Dal hava bygt eina satelittmiðstøð, sum kann breiða evangeliska boðskapin út um jarðarríkið uppá 2 sekund, um tey høvdu nóg mikið av peningi. Í dag senda tey á einum satelitti, tí sokallaða muslimsatelittinum, sum tær arabisku stjórnurnar í Norður-Afrika og Miðeystri brúka. Hesin satelitturin røkkur yvir alt Norður-Afrika, Miðeystur, Evropa og Russland eystan fyri Uralfjøllini, men fyri at náa allan knøttin dagliga við evangeliinum á nógvum tungumálum, mugu tey koma inn á 3-4 satelittar. Og tá tørva teimum umleið 3.000-5.000 fleiri fólk sum kunnu stuðla fíggjarliga.

Í dag verða fleiri og fleiri parabolantennur settar upp kring allan heim, meðan kaðal-sjónvarp til heilar býir er knýtt at satelittum. Frá januar 1999 byrjaði útbyggingin av kaðal-sjónvarpi í 10.000 kinesiskum býum. Í indisku landsbygdunum koma øll bygdarfólkini saman í garðinum hjá tí sum hevur parabol. Í Iran hava tey parabolantennur gjørdar sum taksteinar, fluttar inn úr Japan.

Skjótt fer hvør einasta landsbygd á jørðini at hava parabolantennur. Og frammanfyri sjónvarpsskíggjanum verða nógvir tímar brúktir dagliga. Tey flestu menniskjuni á jørðini, skilja okkurt av teimum stóru høvuðstungumálunum, so við at senda á enskum, kinesiskum, sponskum, fronskum, russiskum, swahili, urdu, arabiskum, hindi og japanskum, kunnu nærum øll fólk á jørðini skilja boðskapin.

Ótrúligt, at ápostulin Jóhannus tá ið hann sat á Patmos kundi greiða frá hesi sjón longu tá, og sum nú er okkara dagligi dagur: »Eg sá annan eingil flúgva mitt uppi undir himli; hann hevði ævigt evangelium at kunngera teimum, ið á jørðini búgva – øllum tjóðum, ættum, tungumálum og fólkum«. Opinberingin 14,6.

Jú, samanumtikið sera áhugavert. Bert spell, at ein persónur við so stórum virkisøki, ikki hevur nakran týdning í programminum hjá okkara fjølmiðlum. Talvkongurin er bæði væl og virðiliga umrøddur og verður tað helst teir næstu dagarnar eisini, og alt gott um tað. Men vónandi fara okkara fjølmiðlafólk í framtíðini at geva gætur hvat hendir í talvinum hjá konganna Kongi.